ið kom hann eina ferð til Havnars seint eitt kvøld saman við konu síni. Hann visti sær ongastaðni at gista. Hotellini vóru full. So kemur hann í tankar um ta gomlu arbeiðsgentuna hjá teimum, Margretu, og leitar hana upp. Her vóru tey móttikin við opnum ørnum. Hermann var eisini "hangandi", um tað kann sigast so. Jens Petur arbeiddi hjá Poul Hansen, og Hermann kom at arbeiða har. Tá ið Jens Petur fór til Suðuroyar at skipa ein deild hjá Poul Hansen, fylgdi Hermann eisini við her.

Tað var sera ófriðarligt í Havn undir krígnum. Í seinasti Miðviku greiddu vit frá, tá ið Johan Norðfoss sá armeraða trolaran Lincoln City verða bumbaðan og søktan.

Hetta eygleiddi Jens Petur úr teirra køksvindeyga, meðan mamman var á veg oman í kjallaran. Jens Petur sá bumbuna fara niður við skipinum. Hann tekur til, hvussu kvikir næmingarnir á sjómansskúlanum vóru, tá ið teir lupu avstað at bjarga teimum, sum bjargast kundu.

Eftir hesa hending ásannaðu fólk, at tað var ov vandamikið av búgva í Havn. So Margretha fór saman við Jens Petur vestur til Miðvágs, har tey vóru í tvey ár. Petur plagdi so at koma vestur at vitja tey.

*Foreldrini hjá Margrethu, Henrietta og Jóannes saman við soninum Harald*

*Margretha sum ung*

*Margretha og Petur*

## Gott samband við familjuna

Annars tókst Margretha við nógv. Hon hjálpti Herthu, systir Petur á matstovuni, sum hon rak í Tungugøta. Her man kunnskapurin frá danska húsarhaldsskúlanum vera komin til nyttu.

Hon plagdi eisini at hjálpa Helenu í hennara arbeiði sum jarðarmóður. Jarðarmøður høvdu vanliga álitiskvinnur at hjálpa sær. Tað verður annars sagt um Helenu, at hon hjálpti tveimum av sínum yngstu systkjum til verðina.

Tað er kent, at tað eru góð viðurskifti millum hesa Egholmfamiljuni. Tey vit hava tosað við láta eisini framúr væl at Margrethu. Hon var altíð fitt og blíð og eisini skemtingarsom.

Tað er eisini gott samband millum hesa Egholmarar og ættina hjá Onnu Sofiu, mammu Petur. Hon var ættað úr Funningi, og nógv av teimum hava greitt frá, hvussu tey hava verið í Funningi og ferðast, har tey altíð vóru væl móttikin. Jens Petur minnist eisini, at tey eina ferð vóru tríggjar vikur í Funningi. Tá búðu tey hjá Osvaldi og mostrini Karolinu.

Anna Sofia átti tvær systkin í Havn. Annað teirra var Petronella, gift við Vilhelm Tórsheim. Hon doyði longu í 1910. So var tað gamli Knút skómakarin, sum var giftur við Isalinu, systir Djóna í Geil. Tey/vit kenna okkum øll sum skyldfólk.

Nú eru ikki nógv eftir av ættarliðnum hjá Margrethu. Umframt Margretha er tað bert Gunhild, sum býr í Danmark og Steingrím Joensen, sum býr á Argjaboga á Argjum.

Margretha fekk sonin Jens Petur. Hann fekk sítt lívsstarv hjá Poul Hansen, har hann arbeiddi í 46 ár. Hann er nú 75 ár, so Margretha kann gleða seg um, at sonurin er undansloppin! Kona Jens Petur er Sólrun.

Jens Petur eigur tvey børn, Petur er giftur við Jónu f. Jacobsen úr Sørvági og Hanna Margretha er gift við Trónda við Á av Velbastað. Margretha eigur sjey langommubørn. Sum tað liggur í kortunum verður hon eisini olduromma fyrsta dagin.

## Hvat hendi í 1903

Tað kann sigast, at Margretha hevur upplivað stórt sæð allar broytingar í samfelagnum. Tá ið hon var fødd var eingin bilur, einki ravmagn, eingin motorur í skipunum, eingir vegir fyri at nevna nøkur dømi. Tað var heldur ikki partapolitikkur.

Men í 1903 verður Jóannes Patursson fyrstu ferð valdur á fólkating við 10 atkvøðum í meiriluta.

Inntøkurnar hjá tinginum tvífaldast av einum avgjaldi uppá kr. 50 fyri hvønn stórhval.

Kirkjumálaráðharrin gevur loyvi til, at føroyskt kann nýtast í kirkjunum í serligum førum. Løgtingið er ímóti.

Tað verður kjakast um at fáa ein mola í Havn. Hann kom kortini ikki fyrr enn nógv ár seinni.

Niels Finsen fær Nobelvirðisløthings fyri fyri sína ljósviðgerð.

Skonnartin Cyklone úr Vági hvørvur við 16 monnum. Eingin kundi skilja hetta, tí veðrið var av tí besta. Greitt verður frá hesum í fyrstu Dimmalætting eftir at Margretha er fødd.

Trúboðarin Daniel J Danielsen úr Havn luttekur í eini kanningarferð í Congo saman við bretska konslinum Roger Casement. Frágreiðing frá hesi ferðini er byrjanin til endan hjá privata stýrinum hjá belgiska Leopold kongi í Congo.

Tað verður opið hús á Lágargarði føðingardagin kl. 15-17.

Vit ynskja Margrethu og hennara hjartaliga tillukku við hesum stóra degnum.

**ó.**

*Starvsfólk á Lágargarði sum hava tikið so væl hond um Margrethu. Myndin er tikin á hundrað ára degnum, og tær eru framvegis um hana*